gult22 cyan22 magenta22 svart22

Eingin venjari og eingin málverji í FCK

Í dag fara Todi og teir undir venjingina, uttan at tað er gjørt av, hvør skal loysa Roy Hodgson av, og um Thomas Myhre skal halda fram sum málverji

DANMARK
Jóannes Hansen

22. juli verður farið undir eitt nýtt kappingarár í donsku superliguni. Og í august skal meistaraliðið FCK gera fyrstu royndina á vegnum til bólkaspælið í europeisku meistarakappingini. Tað er har, at teir nógvu pengarnir eru at vinna.

Eftir stutta summarsteðgin hittast FCK spælararnir fyrstu ferð til venjingar á Frederiksberg í dag. Todi Jónsson kom ein stuttan svipp til Klaksvíkar mánadagin. Týskvøldið nýttu nógvir vinir, kenningar og fjepparar annars høvi at heilsa upp á danska meistaran, sum var á Statoil støðini í Klaksvík, og í gjár skuldi Todi fara av aftur landinum.

Um mjørkin ikki argaði so nógv, at hann ikki slapp av landinum í gjár, so verður Todi Jónsson ímillum FCK spælararnar, sum í dag fara undir nýggja kappingarárið. Skaðin, sum helt Toda uttanfyri, tá tað varð staðfest, at FCK eigur besta fótbóltsliðið í Danmark, er burtur, og nú er Todi klárur at stríðast við Zuma, Fernandez, Simpson og hinar, sum eru evni til tey bæði álopsplássini í FCK.

Eingin venjari

Tað gongur ofta skjótt í fótbólti, so tað kann væl vera, at støðan er ørðvísi, tá hesar reglurnar koma út ímillum fólk, enn hon var, tá tær vórðu skrivaðar. Men í gjár var tað ein veruleiki, at ongin høvuðsábyrgdarmaður var funnin at taka við venjarastarvinum, sum hevur staðið tómt, síðani Roy Hodgson gjørdi av, at góða veðrið, størri ítróttarliga avbjóðingin og ikki minst nógvu pengarnir í Italia vóru meiri áhugaverd enn danski høvuðsstaðurin og FCK.

Todi Jónsson hevur ikki verið í FCK, síðani tað frættist, at væl lýddi venjarin hevði sagt upp, og hann og hinir spælararnir vita einki meiri um venjaraspurningin enn onnur, sum fylgja við í donsku og útlendsku fjølmiðlunum.

Venjarastarvið í FCK hevur í vikuni verið viðgjørt í ítróttarpressuni kring alt Europa. M. a. tí bæði eingilsktmenn og týskarar hava verið umrødd sum møgulig venjaraevni í FCK.

Ongland og Týskaland

Í Onglandi hevur verið nevnt, at fyrrverandi landsliðsvenjarin Terry Venables og fyrrverandi liðformaðurin á landsliðnum og venjarin hjá Middlesbrough, Bryan Robson vóru evni til starvið hjá FCK, men Robson hevur sagt, at tað er hann ikki, og í Onglandi hevur verið at hoyrt, at Terry Venables hevur langtíðarsáttmála við sjónvarpsfelagið ITV, sum komandi árini ætlar at gera nógv við bestu eingilsku fótbóltsdeildina.

Eingilsktmaðurin Stuart Baxter hevur eisini verið nevndur. Hann er venjari hjá norska Lyn, sum hevur langtíðar sáttmála við hann. Men tað munnu teir í FCK ikki leggja so nógv í, tí tað er bara ein vika síðani, at teir á egnum kroppi kendu, hvussu lítið sáttmálar hava at siga.

Fyrrverandi týski landsliðsvenjarin Berti Vogts hevur verið nevndur, men í týskum sjónvarpi hevur hann sagt, at tað kennir hann einki til.

Norðurlendingarnir

Fleiri sviar hava verið í myndini. Fyrrverandi danski landsliðsvenjarin Bo Johansson sigur seg ikki vera á veg til FCK, og Hans Backe, sum vandi AaB, tá teir vóru á Tórsvølli fyri tveimum árum síðani, er sáttmálabundin í Salzburg í Eysturríki.

Mest upplagdi sviin til FCK starvið verður Kent Karlsson mettur at vera. Hann hevur áður verið venjari í FCK, men gavst orsaka av sjúku í familjuni. Tað verður hildið, at hann í hvussu so er hevði verið ein góð fyribilsloysn.

Einasti norðmaðurin, sum er í myndini, er Ståle Solbakken. Í fleiri donskum bløðum verða hann og Kent Karlsson roknaðir sum mest uppløgdu evnini. Norska blaðið VG veit at siga, at Ståle Solbakken í hesum døgum er á intensivum venjaraskeiði í Noregi, og tað er nóg mikið til nógvar greinir og innsløg í svongu miðlunum.

Og so eru fleiri danir nevndir. Millum teirra eru Jan Mølby, sum sjálvur sigur, at hann ikki er á veg úr Onglandi og til Keypmannahavnar. Ein annar er Silkeborg venjarin, Benny Johansen, sum var FCK venjari, tá teir vóru meistarar fyrst í níti árunum. Men hann er sáttmálabundin í Jyllandi og sigur seg ikki vera á veg til FCK.

Michael Laudrup hevur verið nevndur, men hann sigur nei, og so er tað Niels Christian Holmstrøm, sum nú er ítróttarstjóri í FCK. Hann hevur áður verið venjari í báðum feløgunum, sum eru grundarlag undir FCK – KB og B1903 – men maðurin, sum fram um allar aðrar brummaði, tá Todi Jónsson kom skaddur aftur av landsliðsferð, sigur seg ikki hava stundir til venjarastarvið.

Í donskum fjølmiðlum verður roknað við, at ein loysn – kanska ein fyribilsloysn frá nú av og til eina ferð í heyst – verður almannakunngjørd í dag ella kanska seinni í hesi vikuni.

Enn hevur FCK ikki funnið útav, hvør skal setast sum venjari fyri Roy Hodgson

Um eingin venjari er settur í dag, so verður tað hjálparvenjarin higartil, Carsten V. Jensen, sum í síni tíð spældi bæði við Brøndby og FCK, sum fer at standa fyri venjingini. Men sjálvandi er tað ikki nøktandi fyri felagið og spælararnar, at FCK ikki hevur funnið ein avloysara fyri venjaran, sum teir hildu seg skula hava í felagnum alt tað nýggja kappingarárið.

Ivi um málverjan

Tað er eisini greitt, at tá Todi Jónsson og hinir í FCK í dag hittast til venjingar, so verður Thomas Myhre ikki saman við teimum. Norski landsliðsmálverjin, sum stóð seg so væl í FCK í vár, er í summarfrí. Hann er framvegis sáttmálabundin at Everton, sum kortini vil sleppa av við hann. Úr frítíðarstaðnum sigur Thomas Myhre við danskar fjølmiðlar, at hann vónar, at umboðsmaðurin hjá honum heilt skjótt fer at finna honum eitt nýtt felag.

Higartil hevur Thomas Myhre ikki verið serliga áhugaður í at halda fram í FCK. Tað tykist sum eitt spæl gongur fyri seg um pengar. Sambært donsku pressuni, so er marknaðarprísurin, sum teir kalla tað, á Thomas Myhre fallin rættuliga nógv síðstu tíðina. Í fjør segðist prísurin vera 35 milliónir, men nú sigst, at málverjin kann keypast fyri ímillum fimm og tíggju milliónir. Eitt er upphæddin, sum Everton vil hava fyri norska málverjan. Eitt annað er, hvat málverjin og nýggja felagið hjá honum kunnu semjast um, at mánaðarlønin skal vera. Tað er í hesum, at tað tykist ganga eitt spæl fyri seg ímillum FCK og Thomas Myhre.

Men undir øllum umstøðum skal FCK hava ein mann at standa í málinum. Og fyri føroyingar, sum eru áhugaðir í fótbólti, spøkir møguleikin framvegis, at tað kanska verður Jákup Mikkelsen. Men nú fáa vit at síggja, um henda óynsturin fer at gerast veruleiki ella ikki. Undir øllum umstøðum er tað framvegis stuttligt at spæla sær við møguleikan, at aftasti og fremsti maðurin á danska meistaraliðnum høvdu verið føroyingar, tá FCK fer at royna seg í europeisku meistarakappingini!

Heldur ikki er greiða funnin á, hvør skal taka yvir á málverjasessinum, ella um Thomas Myhre heldur fram í felagnum

gult23 cyan23 magenta23 svart23

VIÐMERKINGAR

Ikki fleiri ferðsluvanlukkur, takk!

Soljóðandi skriv er 12. juni 2001 sent til: Bjarna Djurholm, landsstýrismann við Ferðslumálum, Ráðið Fyri Ferðslutrygd og Fjølmiðlarnar

Føroya-MC
Nevndin

Síðani ta syrgiligu vanlukkuna á Skálafjørðinum fyri kortum, hevur verið kjakast um, hvat ið kann gerast fyri at forða fyri, at slíkt kann henda aftur. Nógvir møguleikar hava verið nevndir, og teir flestu ganga út uppá, at forboð av ymsum slag skal hjálpa – t.d. at blomba bilarnar, fyribils koyrikort til tey ungu, at ung ikki skulu hava loyvi at koyra aftaná kl. 24 um náttina o.s.fr.

Spurningurin er so, um hetta hevði hjálpt nakað!

Eitt er tó heilt greitt; menniskjan hevur gjøgnum allar tíðir havt eitt tíðarskeið, tá skiftið frá barn til vaksin útloysir eina trongd til at royna mørk, ella, sum summi siga, "rasa út" Hetta er ein partur av búningini og leitanini eftir sínum samleika. Ymiskt er tó frá persóni til persón, hvussu hetta verður gjørt; hjá teimum flestu er tað soleiðis, at eingin leggur stórvegis merki til tað. Soleiðis skal ungdómurin jú vera, siga tey flestu við einum smíli.

Men hjá nøkrum, serliga dreingjum, skal meira til, og her er tað ofta, at bensin og ferð gevur tann spenningin, ið teir leita eftir. Spurningurin er, um hetta ikki er ein veruleiki, sum ringur verður at venja seg av við.

Ein kundi hugt at øðrum, sum ungdómurin í Føroyum hevur upplivað. Fyri nøkrum árum síðani høvdu dansistøðini í Havn bert opið til kl. 01 um náttina. Tað var júst um tað mundið, tá øll vóru blivin í góðum lag, og so vórðu øll koyrd út á gøtuna aftur. Úrslitið varð, at býurin var fullur av fólki, sum ikki tímdi heim, og burturúr hesum støðst bardagi og herverk í hópatali hvørt vikuskifti, soleiðis at politiið við hundum í heilum var at síggja fyri at halda skil á.

Henda býarmyndin er nógv broytt hesi seinastu árini – hví kann man so spyrja!? Jú, nú er dansurin opin til kl. 04, og tá hava fólk fingið tað, sum tey vildu, og eru troytt.

Spurningurin er, um ikki tað sama er galdandi fyri hesar ungu dreingirnar, ið vilja royna mørk við at koyra skjótt í bili. Man hevur hoyrt um, at politiið hevur roynt at steðga hesari hasardkoyringini, men teir ungu finna upp á ráð. Ístaðin fyri at steðga við at koyra kapp, skipa teir fyri skipaðari kappkoyring, soleiðis at bilar við fartelefonum syrgja fyri, at teir sum koyra, fáa boð um politiið kemur.

Hvat við at gera sum við dansinum? Um vit gera teimum tað, teir vilja hava, men undir skipaðum viðurskiftum, kundu teir kanska sloppið av við bensininum, sum teir hava í blóðinum, uttan at tað skal vera so vandamikið.

Ein koyribreyt neyðug

Nevndin í Føroya-MC hevur kjakast nógv um hetta, og vit vilja staðiliga mæla til, at ein koyribreyt verður bygd í Føroyum. Við einari koyribreyt hugsa vit um tað, tey í Danmark kalla eitt "koyritekniskt anlegg" saman við einari hálkubreyt. Ein slík koyribreyt kann nýtast av fleiri ymiskum málbólkum. Til dømis kunnu koyrilærarar nýta hana til koyrifrálæru av óroyndum næmingum – hetta er krav í hinum Norðurlondunum, og eisini til at næmingarnir kunnu fáa royndir í at fáa tamarhald á einum bili í hálku, uttan at vera til ampa í ferðsluni ella at koma øðrum í vanda. Yvirhøvur vildi eitt hálkuskeið komið væl við hjá nógvum førarum – eisini teimum, ið hava havt koyrikort í nógv ár.

Eisini vildi ein koyribreyt verið frálík til buss- og lastbilførarar, soleiðis at teir sleppa frá at fara til Danmarkar, hvørja ferð teir skulu á skeið.

Tó hugsa vit eisini, at ein slík breyt kann nýtast til kappingar, t.d. við motorsúkklum, knallertum ella go-kart, har ið kappast verður undir skipaðum viðurskiftum. Flestu, sum hava hug at kappast á motorakførum, siga at ferðin ikki er avgerandi. Tað, sum tað oftast snýr seg um, er at tað skal vera spennandi, og at man kann royna síni mørk.

Ein koyribreyt kann gerast soleiðis, at nógv sving eru á henni, og hetta ger, at ferðin ongantíð verður so nógv. Mørkini kunnu sum oftast líka so væl røkkast við 50 km/t. sum við 200 km/t.

Ein annar munur á alfaravegi og einari breyt er, at um koyrt verður út av alfaravegi, so er tað ofta bert 2 metrar til tann næsta hamaran ella brattlendi. Á einari breyt eru kanska 20 metrar til tað mun av dekkjum, har ímillum leyst grús ella mold, sum steðgar tær áðrenn tú nakrantíð kemur so langt.

Aðrastaðni, t.d. í Danmark, kunnu børn/ung sleppa at koyra á einari koyribreyt við go-kartum, knallertum og lítlum motorsúkklum longu frá 10 ára aldri, og tey læra sostatt líðandi at koyra.

Um ein koyribreyt bleiv bygd í Føroyum, var tað kanska ein gongd leið, at tey ungu sluppu at læra seg at koyra nøkur ár áðrenn tey fingu koyrikort til knallert, t.d. um 14 ára aldur. Hetta kundi vónandi ført við sær, at tey lærdu at koyra trygt á einum avbyrgdum øki, og ikki úti í ferðsluni, sum tað er í dag, og kanska eisini gjørt, at tey fingu virðing fyri tí, tey koyra við. Teir (serliga dreingirnir), sum hava ov nógv bensin í blóðinum, tá teir eru 18 ár, hava tað helst eisini, tá teir eru 14 ár, og vildu ivaleyst verið teir fyrstu, ið teknaðu seg til at koyra á einari breyt, um møguleiki var til tess. Hetta vildi so eisini gjørt, at teir kundu avreagerað og roynt síni mørk á koyribreytini undir skipaðum viðurskiftum (og sjálvandi við ásettum reglum), og ikki úti í ferðsluni!

Tað er ein sannroynd, at tað, sum ein lærir mest av, er ein feilur. Og um ein tú koyrir á einari koyribreyt við einari knallert, sum ikki koyrir meira enn umleið 50-60 km/t., og ert í neyðugari trygdarútgerð, kundi tú royndt tíni mørk og gjørt onkran feilin, uttan at tað hendi meira, enn at tú fekst eitt sindur ilt. Sami feilur við 200 km/t. á alfaravegi kann kosta nógv meira enn tað – bæði fyri tann, ið koyrir, og møguliga onnur eisini.

Hugburðsbroyting

Vit meina avgjørt ikki, at forboð hjálpir upp á nakað, tvørturímóti. Vit halda, at tað er neyðugt at broyta hugburðin hjá teimum ungu – serliga dreingjunum, og tann bólkurin, ið best kann ávirka hesar dreingir, eru tær ungu genturnar. Í Danmark hava fleiri amt saman við Rådet for Større Færdselssikkerhed gjørt eitt átak, har tey royna at fáa tær ungu genturnar at ansa eftir dreingjunum. Hesar gentur, sum melda seg sjálvbodnar, verða nevndar "verndareinglar", og tær fáa so ta uppgávuna at ansa eftir, at dreingirnir ikki fara at koyra bil, ávirkaðir av rúsdrekka ella øðrum.

Hetta halda vit kundi verið eitt hugskot at roynt í Føroyum, ikki bert viðvíkjandi at koyra ávirkaður, men eisini viðvíkjandi at koyra ov skjótt. Tað kundi t.d. verið, at vinkonan tók billyklin frá dreinginum, um hann hevði drukkið, at genturnar nokta at koyra við dreingjunum, um teir koyra ov skjótt, ella at tær á annan hátt tosa til teirra samvitsku.

Fyri at broyta henda hugburðin, meina vit tó at tað er neyðugt við einari koyribreyt, har dreingirnir kunnu sleppa at koyra, tí teir mugu og vilja sleppa av við hesa trongdina eftir spenningi á ein ella annan hátt.

Ein annar máti at ávirka hesar dreingirnar er bólkatrýst (á ein positivan hátt). Her hugsa vit um, at fyri nøkrum árum síðani vóru tað bert heilt fá, ið koyrdu við røttum trygdarklæðum og hjálmum á motorsúkklu. Tá var tað kovboybuksur og gummistyvlar, men í dag sær myndin heilt øðrvísi út. Í dag verður tað næstan ikki góðtikið, um tú ikki hevur hóskandi klæðir at koyra í, og so slettis ikki, um tú ongan hjálm hevur, og hetta er uttan løggeving!

Tað er cool at vera tryggur

Tað átti ikki at verið neyðugt at hækka bøturnar, fyri at fáa fólk at nýta hjálm, trygdarfetil og onnur ting, sum eru til fyri at verja tey. Ístaðin má tað blíva soleiðis, at tað er cool millum tey ungu (eins og tey eldru) at vera tryggur, og ikki at tað er cool at koyra svakt og uttan trygdarútgerð.

Vit halda, at Ráðið Fyri Ferðslutrygd ger eitt dygdargott arbeiði við at royna at broyta hugburðin hjá børnum – t.d. við at øll 1. klassa børn fáa ein súkkluhjálm, og allir 9. klassa næmingar fáa ein dag við frálæru hjá Ráðnum Fyri Ferðslutrygd, men tað vilja tó altíð vera nøkur, har hesin boðskapurin ikki rínur við, og tá halda vit, at fyribrigdið "verndareinglar" kundi verið vert at roynt. Í øllum førum mugu vit fara aðrar vegir enn teir traditionellu.

Samanumtikið halda vit, at hetta við at koyra ov skjótt, og trongdin hjá teimum ungu at royna veingirnar, ikki er nakað, ið sleppast kann av við. Spurningurin er bert, hvussu kunnu vit gera tað soleiðis, at tað ikki krevur fleiri mannalív?

Sum eitt áhugafelag fyri motorsúkklukoyrarar hava vit fleiri limir, sum júst hava nógv bensin í blóðinum, og nakrir av hesum hava verið í Danmark og roynt at koyrt á koyribreytum undir skipaðum viðurskiftum, so tað er sostatt eisini út frá royndum, at vit skriva hetta bræv.

Vónandi kunnu vit við hesum orðum geva teimum ungu dreingjunum, teimum ungu gentunum, teirra foreldrum og okkara politikarum nakað at hugsa um.

Viðmerking til Dag og Viku

Fleiri ellis- og røktarheimspláss – ja ongantíð ov skjótt

Helena Dam á Neystabø
Sjálvstýrisflokkurin

Einki er at bíða eftir, men tað skulu pengar til. Skulu vit nøkta tørvin á ellis- og røktarheimsplássum, so kostar tann íløgan uml. 300 milliónir krónur – og tað fer at kosta uml. 100 milliónir krónur meira í rakstri um árið. Hetta er tað, tað kostar. Og tað er meiri enn tað dupulta av tí, sum vit játta til røktarheimsøkið í dag.

Politikkur er eitt val. Vit velja at skerja blokkin við 400 milliónum longu komandi ár. Samgongan hevur ætlanir um at seta hol á ein undirsjóvartunnil afturat longu næsta ár, og aðrar stórar íløguætlanir eru settar út í kortið. Tað má og skal ein umprioritering til.

Flest øll kenna mína støðu. Íløgur í viðurskiftini hjá teimum gomlu, sum hava lagt lunnar undir samfelagið Føroyar í dag, skulu veljast fram um. Vit skulu bíða við teimum stóru íløgunum til vit ikki longu skammast um tey viðurskifti, sum vit bjóða okkara veikastu. Tað ber saktans til, og tað hevði tænt okkum til heiðurs. Og hetta skal vera mítt uppskot.

Vit eiga at byggja røktarheimspláss fyri 200 milliónir tey næstu 5 árini. Tað er 40 milliónir um árið. Tað átti ikki at tikið samfelagsbúskapin av fótum. So mugu vit heldur lata onkra aðra skinandi íløgu ír støli ella beton bíða.

Tíbetur hava kommunurnar sýnt ábyrgd seinnu árini, og í felag hava tey fingið fleiri sambýli sett á stovn hesi seinastu árini. Og Heimarøktin hevur gjørt eitt stórt arbeiði, soleiðis at búfólkini á sambýlunum hava tað gott. Vit hava útvegað eini 50-60 nýggj pláss hjá eldri fólkum at flyta inn á sambýlir kring allar Føroyar, og ellisheimið og sambýlini á Sandoy eru upplatin. Og tað er samtykt at byggja eitt nýtt ellisheim í Sundalagnum.

So tað er ikki rætt at siga, at einki er hent.